Rumenia-Føroyar 41-19 (19-9) & Føroyar-Rumenia 27-43 (15-27):

# Føroyingar niðurbardir í Rumenia

**Talan var ikki um tað poleraða hondbóltsspælið, men eins nógv um knallharðar og mangan svínskar nærdystir, tá ið føroyska manslandsliðið í hondbólti tvær ferðir dystaðist við rumenar um vikuskifti**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*



*Ingi Olsen varð snøgt sagt slaktaður í seinna dystinum, men ta ferðina lótu italsku dómararnir loksins við seg koma*
*Mynd: Aleksander Djorevic*

Teir hondbóltsáskoðarar, ið ætla sær at hyggja eftir hálvfinalunum í steypakappingini hjá monnum í annaðkvøld, fara ikki at hava teir stóru trupulleikarnar við at síggja, hvørjir av leikarunum á vøllinum havi verið við landsliðnum í Rumenia í vikuskiftinum - tað eru nevnliga teir, sum eru fullir av bláum, gulum og grønum merkjum ymsastaðnis á kroppinum!

## Alt var loyvt

Seint sunnukvøldið fingu vit fatur á einum av føroysku leikarunum, Halgir Dahl-Olesen úr H71, tá ið føroyska landsliðið var komið á eitt gistingarhús í rumenska høvuðsstaðnum Bukarest. Her skuldu teir gista mánanáttina, áðrenn leiðin tíðliga mánamorgunin gekk aftur til Føroya umvegis Keypmannahavn.

Halgir sigur, at hann ongantíð hevur upplivað nakað líknandi hesum báðum dystunum ímóti rumenum. Rumenska liðið spældi serstakliga hart, beinleiðis svínskt, sigur Halgir og leggur aftrat, at dómararnir úr Italia eisini loyvdu ómetaliga hørðum spæli. Alt var loyvt, sigur hoyvíkingurin, sum heldur føroyska liðið í fyrra dystinum bleiv eitt sindur paff av harða spælinum, og av tí sama fekk ein kollektivan niðurtúr.

## Fortreytirnar vóru ikki av teimum bestu

Sum vit skrivaðu í blaðnum fríggjadagin var ivi um onkran av leikarunum undan dystunum. Størstur var ivin um málverjan Eli Müller, og tað vísti seg eisini, at hann bleiv ikki klárur til dystirnar báðar. Hetta merkti samstundis, at føroyska liðið bert hevði tann eina málverjan, nevnliga unga hvítanesmannin Levi Nybo, sum til dagligt er málverji í H71.

Haraftrat var Hans Áki Dal-Christiansen, sum er ein av okkara stinnastu serliga í verjuni, eisini skaddur. Og fyri at gera ilt verri fekk ein av okkara vandamiklastu álopsleikarum, Sveinur Justinussen, ein álvarsliga skaða, tá ið fyrri dysturin landana millum ikki var meira enn hálvrunnin.

Hetta gjørdi, at landsliðsvenjarin, Lars Nedergaard, ikki hevði teir stóru møguleikarnar at skifta út, og Halgir Dahl-Olesen sigur, at tað kostaði at taka so nógvar nærdystir bæði í álopi og verju. Serliga tungt var tað hjá okkara bakspælarum, tí vit vóru so fáir, sigur Halgir.

## Seinni dysturin væl betur enn tann fyrri

Sambært Halgir Dahl-Olesen var føroyska avrikið væl betri í dystinum sunnudagin, enn tað var í fyrra dystinum fríggjadagin. Sum áðurnevnt fekk liðið ein kollektivan niðurtúr fríggjadagin, eftir at teir høvdu megnað at fylgt við rumenum í eitt lítið korter.

Í fyrra dystinum vardu rumenar sera offensivt, og av tí sama bleiv talan um nógvar nærdystir, har rumenar fingu loyvi til at gera, næstan hvat teimum lysti við føroysku leikararnar, sigur Halgir. Hetta tók sum áðurnevnt pippið frá føroyingunum, ið als ikki eru vanir við at so hart spæl verður loyvt.

Halgir heldur, at føroysku leikararnir blivu eitt sindur bangnir av harða og svínska rumenska spælinum. Onkur fekk eisini ein



*Heldur ikki landsliðsvenjarin tóktist halda serliga nógv um dómaraavrikið*
*Mynd: Aleksander Djorevic*

alboga onkrastaðni, ein fekk ein frammaná og allir vóru teir bæði gulir og bláir ymsastaðni á kroppinum eftir dystirnar.

Í seinna dystinum gekk tó væl betur. Tá fylgdi føroyska liðið við rumenum at kalla allan fyrra hálvleik, men seinastu løtuna fyri steðgin gjørdu rumenar tó ein ordans vørr og fóru til hálvleiks við eini sjeymáls leiðslu, greiðir Halgir frá. Um orsøkina til at tað gekk betur í seinna dystinum, sigur Halgir, at til seinna dystin vóru teir fyrireikaðir til harða spælið og allar ónoturnar, og tí fóru teir ikki niður við høvdinum.

Ikki tí, rumenska áskoðarafjøldin royndi eisini at gera sítt til, at føroyingar mistu pippið. Halgir greiðir frá, at hvørja ferð okkurt bleiv dømt til fyrimuns fyri føroyingar ella okkara menn fingu eitt mál, buhaði hvør einasti áskoðari í høllini eftir teimum. Í fríggjadagsblaðnum nevndu vit, at roknað var við upp til 3000 áskoðarum til landsdystirnar, men so var ikki, tí áskoðarafjøldin var neyvan oman fyri tey túsund.

## Ingi bleiv slaktaður

Í dystinum sunnudagin helt harða rumenska spælið fram, og til seinast gav tað tó bakslag fyri rumenska liðið. Føroyski liðskiparin, Ingi Olsen, leyp upp og gjørdi ein skotfintu, og tá fekk báðar nevarnar frá einum av rumensku verjuleikarunum beint í andlitið. Ingi lá sjálvsagt skerflatur, og italsku dómararnir hildu hesa gerð verða so mikið álvarsliga, at rumenski verjuleikarin fekk beinleiðis reytt kort. Hetta merkir allarhelst, at rumenar noyðast at verða viðkomandi leikara fyri uttan í fyrra dystinum ímóti Noreg, og tað hóvaði teimum als ikki.

Ein skuldi trúð, at hetta fekk rumensku leikararnar at verða eitt sindur hóvligari í sínum spæli, men so var ikki, heldur tvørturímóti, sigur Halgir Dahl-Olesen. Nú var tað, sum um at vit skuldu fáa tað hevnt, at ein av teirra leikarum allarhelst fór at fáa leikbann ímóti normonnum, sigur Halgir.



*Í seinna dystinum gjørdi serliga Heini Hanusarson um seg, og við 11 málum skeyt hann helmingin av føroysku málunum ta ferðina*

## Norðmenn fáa tað trupult í Rumenia

Spurdur um hvat liðið er tað sterkara, Rumenia ella Noreg, sigur Halgir Dahl-Olesen, at normenn fara at fáa tað trupult í Rumenia, men at teir samanlagt verða omaná. Liðskiparin hjá H71 sigur, at norska liðið er tað betra hondbóltsliðið, og at normenn heldur ikki eru aftanfyri rumenar í kropsstyrki. Spurningurin er bara, hvussu hart spæl verður loyvt av dómarunum.

Í sama viðfangi nevnir Halgir, at um tað høvdu verið norðurlendskir dómarar, ið høvdu dømt dystirnar millum føroyingar og rumenar um vikuskiftið, høvdu okkara menn neyvan tapt við meiri enn okkurt um tíggju málum!

# Landsdystirnir ávirka steypakappingina

**Tað er ikki sørt, at landsdystirnir ímóti rumenum ávirka tey fýra liðini, ið mikukvøldið skulu leika fyrru hálvfinalurnar í steypakappingini**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*

Í annaðkvøldið verða fyrru hálvfinalurnar í steypakappingini leiktar. Hjá monnunum hittast H71 og Kyndil í aðrari, meðan StÍF og VÍF hittast í hinari hálvfinaluni. Øll fýra liðini hava havt leikarar við landsliðnum í Rumenia, og øll hava leikarar, ið venda meira ella minni skaddir heimaftur.

## StÍF og VÍF missa lyklaleikarar

Størsti missurin er óivað hjá strandingum og vestmenningum. Stóri málskjúttin hjá StÍF, Sveinur Justinussen, breyt sær hondina í Rumenia, sum nevnt aðrastaðnis á síðuni, og hann verður ikki klárur aftur fyrr enn miðskeiðis í februar.

Málverjin hjá VÍF og føroyska landsliðnum, Eli Müller, hevur eisini skaða at dragast, og tá ið vit tosaðu við føroysku landsliðsleguna sunnukvøldið, søgdu teir, at tað í mesta lagi var 10 prosents møguleiki fyri, at Eli var førur fyri at leika mikukvøldið.

Hjá Kyndli hava báðir landsliðsleikararnir, Hans Áki Dal-Christiansen og Janus Einar Sørensen, trupulleikar at dragast við. Hans Áki var ikki við í dystunum ímóti rumenum, tí at hann hevði trupulleikar við øksluni, og ógvuliga ivasamt er, um hann verður tøkur til dystin mikukvøldið. Janus Einar hevði onkran smávegis snudd undan landsdystunum báðum, og úr Rumenia frætta vit, at hann fekk av álvara roynt sína styrki. Janus Einar fekk so nógvar stoytir frá rumenum, at nú hann vendir heim aftur, er mest álíkur einum ælaboga, so nógv blá, grøn og gul merkir hevur hann. Tó tykist tað ikki verða nakar ivi um, at sterki strikuspælarin hjá oddaliðnum verður klárur til dystin í annaðkvøld.

Hoyvíkingar høvdu Halgir Dahl-Olesen, Heina Bentsen og Levi Nybo við á landsliðnum, og nú teir koma aftur, hevur Heini Bentsen ein snudd at dragast við. Í eina landsdystinum fekk Heini eitt trælær, men helst er tað ikki meiri álvarsamt enn at hann er við ímóti Kyndli.

# StÍF uttan Svein í knappan mánað



*Sveinur Justinussen hevur nú gips um hondina, og komandi mánaðin ella so má hann taka til takkar við leiklutin sum áskoðari*
*Mynd: Aleksander Djorevic*

**Evnariki Sveinur Justinussen var so óheppin, at hann breyt eitt bein í hondini í fyrra landsdystinum ímóti rumenum. Hetta er ein dyggur smeitur fyri StÍF, ið nú má verða Svein fyriuttan í knappan mánað**

HONDBÓLTUR
*Terji Nielsen*

Hann var spælarin, ið skaraði burtur úr í dystunum ímóti norðmonnum, í næstseinastu viku, men ímóti rumenum fekk Sveinur Justinussen ikki tann stóra møguleikan fyri at prógva sínar dygdir.

## Hendiligt óhapp

Beint eftir steðgin í fyrra dystinum ímóti Rumenia, ið var leiktur fríggjadagin, var Sveinur óheppin. Í telefonini úr Bukarest greiðir Sveinur frá, at hann rann aftur at verja, tá ið rumenar vóru á veg í skjótálop. Í einum tilvildarligum nærdysti við ein mótstøðumann meiddi hann sær vinstru hond, og kanningar vístu seinni, at eitt bein við lítlafingur var brotið. Sveinur hevur fingið hondina í gips, og hann hevur fingið at vita, at hann skal hava gipsið á í okkurt um tríggjar vikur.

Hetta er sjálvsagt ein dyggur smeitur fyri StÍF nú farið verður undir endaspælið í landskappingini, og hálvfinalurnar í steypakappingini, har StÍF skal dystast við VÍF, standa fyri durðum.

Sjálvur heldur Sveinur tó, at talan ikki er um tann stóra missin fyri strandingar, tí sambært honum er rættuliga nógv gott fólk at taka av.

## Rumenar ikki betur enn norðmenn

Um landsdystirnar um vikuskiftið sigur Sveinur, at hann heldur ikki, at rumenar vóru eins góðir og normenninir. Sveinur heldur, at normenninir eru væl betri hondbóltsspælarar enn rumenarnir, meðan rumenarnir kanska hava ein lítlan fyrimun í tí kropsliga spælinum.

Høvdu føroyingar havt alt fólkið tøkt til dystirnar, hevði úrslitið allarhelst eisini verið betur, sigur Sveinur Justinussen. Hann nevnir í hesum sambandi, at bæði Eli Müller og Hans Áki Dal-Christiansen vóru ikki førir fyri at spæla vegna skaða, og haraftrat vóru tað fleiri aðrir, ið høvdu ymiskar smærri skaðar at dragast við.

Hinvegin sigur Sveinur, at seinni dysturin var væl betri enn tann fyrri, og í dystinum sunnudagin gjørdi kollfirðingurin Heini Hanusarson av álvara vart við seg. Hann skoraði ikki færri enn ellivu mál, og skoringsprosentið hjá Heina var ógvuliga høgt, leggur Sveinur Justinussen aftrat í telefonini úr Rumenia.

## Eingin Costin

Tá vit at enda spurdu Svein, um fyrrverandi venjara hansara, rumenin Costin Dumitrescu, ið leiddi StÍF til meistaraheitið seinasta kappingarár, var millum áskoðararnar, sigur Sveinur, at tað var hann ikki. Teir høvdu annars frætt, at Costin fór at koma, men tað vísti seg, at hann var farin á venjingarlegu við liði sínum. Costin Dumitrescu er í dag leikandi venjari hjá einum liði í næstbestu rumensku hondbóltsdeildini.